




# Goymslu-/handilsbygningur á Strondum til sølu

Bygningurin er frá uml. 1965 í tveimum hæddum.
Niðara hæddin er uml. 220 m2 og ovara hæddin uml. 100 m2
Nærri fæst at vita við at venda sær til:

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv. ft.

Frúutrøð 4 · Postboks 6 · FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36 · www.jura.fo

Sosialurin 341800

www.fma.fo

# Søkt verður eftir Samskiftis-fólki til Sjóvinnustýrið

**Uppgávan hjá samskiftis fólkinum er hava dagligt samskifti við reiðarí, klassafeløg og aðrar kundar hjá stovninum. Vit sóknast eftir einum fólki, sum kann formiðla ein greiðan boðskap við støði í ofta torskildum reglum og sum hevur hóskandi áræði og forvitni til at røkja starvið.**

**STARVIÐ FEVNIR M.A. UM HESAR UPPGÁVUR:**
- Samskifta við reiðarí, klassafeløg og undirveitarer
- Fylgja við í broytingum í altjóða krøvum til sjóvinnuna
- Skriva leiðbeiningar og frágreiðingar
- Leggja kunningartilfar á heimasíðuna
- Luttaka í tvørgangandi verkætlanum á Sjóvinnustýrinum
- Annað fyrifallandi arbeiði

**ÚTBÚGVINGARKRAV**
Til starvið krevst ein av niðanfyri nevndu útbúgvingum:
- Útbúgving frá hægri lærustovni
- Skipsføraraútbúgving
- Maskinmeistaraútbúgving
- Verkfrøðingur

**FØRLEIKAKRØV**
- Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni
- Jaligan hugburð

Ynskiligt er, at umsøkjari hevur arbeiðsroyndir í og kunnleika til dygdarmenningarskipanir, so sum ISM og ISO 9001. Somuleiðis er ynskiligt, at umsøkjari hevur starvsroyndir í líknandi starvi hjá t.d. einum reiðarí.

**SETANARTREYTIR**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Vinnumálaráðnum. Starvið verður sett sum skjótast.

**UMSÓKNIR:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 10. januar 2011, kl. 15.00.

Fyrispurningar um starvið kunnu setast til Jákup K. Poulsen, samskipara ella Vilhjálm Gregoriussen, stjóra.

***Umsóknir skulu sendast sum bræv ella teldubræv til:***

Skipaeftirlitið, Postsmoga 26, FO-370 Miðvágur ella fma@fma.fo

Sjóvinnustýrið
Postsmoga 26, FO-370 Miðvágur, fma@fma.fo

Sosialurin 341800

# Lærlingur

KEV leitar eftir góðum lærlingi innan el.

Ert tú opin og erligur, hevur rímiligan kunnleika til teldu og hug at arbeiða innan el, ynskja vit at frætta frá tær.

Fyrimunur er, um tú hevur SIT ella royndir á arbeiðsmarknaðinum í eina tíð.

Send okkum eina skrivliga umsókn við avriti av prógvum v.m.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 29. desember.

Hevur tú okkurt at spyrja um, kanst tú ringja til Oddur á telefon 296060.

KEV

**Kongshavnar El-Virki**
Gulasteinsvegur 30 · FO-610 Saltangará
t-postur: kev@kev.fo

**Føroya Skipara- og navigatørfelag**
Jekaragøta 10 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 316973 · Fax 318516 · fsn@fsn.fo

# Aðalfundur

Aðalfundur verður á Hotel Tórshavn, týsdagin tann 28. desember 2010 kl.11.00 við hesi dagsskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing formansins um virki felagsins í farna ári
3. Framløga og støðutakan til roknskapin
4. Val av nevndarlimum
5. Val av grannskoðara og tiltaksmanni
6. Ásetan av limagjaldi
7. Ymiskt

Gestarøðari: Eilif Gaard, stjóri á Havstovuni

**Føroya Skipara- og navigatørfelag**

# Rakstrargøgn í trotabúgvi til sølu

Vegna trotabúgvið P/F Grón undir trotabúarviðgerð, verða fylgjandi lutir seldir til hægst bjóðandi:

- Bilur, Citröen Jumper, árg. 2007, dieselmotor og hevur koyrt 45.971 km
- Bilur, Hyundai Santa Fe, árg. 2006, dieselmotor, hevur koyrt 94.830 km og hevur 4WD
- Øll viðkomandi rakstrargøgn til bakarí

Lutirnir kunnu síggjast á heimasíðu okkara www.lawfirm.fo og eftir nærri avtalu við Mimi Steintórsdóttir, adv., t-postur ms@lawfirm.fo, ella Nicolu Gram Thomassen, næm., t-postur ngt@lawfirm.fo.

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO · HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

Sosialurin 341800

# POLITI

Vegna ábøtur á Politistøðini í Tórshavn verður øll kundaavgreiðsla, mánadagin tann 13. desember 2010, fyribils flutt til hølini hjá Føroya Landfúta, Yviri við Strond 17, 1. Hædd, 100 Tórshavn.

Avgreiðslan er opin mán. – frí. kl. 10.00 - 15.00

10. desember 2010
Karen Marie Olesen

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin